# Virkishúsið tjóvstartar Summar Festivalin

**Fyrsta tiltakið á Summar Festivalinum 2006 verður í Virkishúsinum fyri ung í Klaksvík. Tríggir tónleikabólkar fara at hava framførslur í Virkishúsinum longu hóskvøldið á festivalinum**

SUMMAR FESTIVALUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Hóskvøldið 3. august kl. 18.00 verður fyrsta tónleikaframførslan á Summar Festivalinum 2006. Tá fer bólkurin The Story Ends á pallin í Virkishúsinum fyri ung í Klaksvík, og seinni á kvøldinum fara tveir aðrir bólkar eisini at hava framførslur í Virkishúsinum.

Stóru útikosertirnar á Summar Festivalinum byrja fríggjakvøldið, men longu hóskvøldið ber til at hoyra bólkar spæla live í Virkishúsinum.

Umframt The Story Ends fara eisini Isadora & The Rebels og Budam at spæla.

**Søgan byrjar við endanum**

The Story Ends er ein progressivur rokkbólkur, sum við sínum lívligum framførslu veruliga kann fáa áhoyrararnar við sær. The Story Ends vendir sær serliga til tað yngra ættarliðið, og tí er tað upplagt, at teir verða við á tiltakinum, sum setir Summar Festivalin í gongd í Virkishúsinum hóskvøldið.

Í vetur var The Story Ends við tónleikakappingini Global Battle of the Bands, og har endaði bólkurin í finaluni í kappingini. Teir vístu enn einaferð í hesari kapping, at teir duga at fáa fólkið við sær, og at tá teir spæla, ja, so er rættiligt lív í.

Sangirnir hjá The Story Ends eru ikki so beint fram, sum rocktónleikur ofta kann vera. Teir duga væl at arbeiða við orðum og løgum, og tá ið talan er um djarvar ungar menn, verður heildin eisini serstøk og spennandi.

**Uppreistur við Isadoru**

Isadora & The Rebels er eitt rímiliga nýtt navn í føroyskum tónleiki, men tey hava longu gjørt vart við seg til ymisk tiltøk. Bólkurin spældi eitt nú í Kagganum nýliga, og har fingu tey góða ummæli fyri framførsluna. Sangarin í bólkinum Guðrið Hansen hevur eisini spælt nógv sum einstaklingur – serliga í høvuðsstaðnum. Hon var við í singer/songwriter kappingini hjá Hafnia Lounge, og hon var eisini við í bólkinum PH5,5 í Prix Føroyum. Guðrið var fyrr í ár í uppskoti til ein av Planetvirðislønunum. Áður hevur Guðrið eisini roynt seg sum sangara í Íslandi, har hon var við í teirra útgávu av sjónvarpskappingini Idols. Har stóð hon seg rættiliga væl. Guðrið og bólkur hennara, Isadora & The Rebels, verða at hoyra í Virkihúsinum hóskvøldið.

**Budam við spennandi tónum**

Hann hevur verið kendur sum framúr góður gittarspælari, men nú er Búi Dam eisini farin at syngja, og hann skapar spennandi tónleik við sínum sanghátti. Búi byrjaði sum ein rocktónleikur, men hann hevur flutt seg líka so nógv yvir í jazz og fólkatónleik seinnu árini.

Tónleikurin, sum Búi nú spælir, verður lýstur sum eitt bland av country og fólkatónleiki, men ikki minst yrkingarnar standa sentralar í tónleikinum. Búi finnur íblástur í mytologi, og honum dámar væl at siga frá søgum í sínum sangum. Búi skrivar sjálvur bæði orð og løg.

Búi hevur nakrar góðar tónleikarar afturat sær. Mikael Blak spælir bass, Rógvi á Rógvu trummur og Magnus Johannesen trummur.



*Budam, Isadora & The Rebels og The Story Ends fara at spæla á Virkishúsinum fyri ung í Klaksvík hóskvøldið á Summar Festivalinum*

# Sangirnir hjá Martini sleppa at royna seg

**- Tá eg standi á pallinum og spæli og syngi, merki eg, um tað tilfarið, ið eg havi gjørt, veruliga heldur ella ei, sigur Martin Joensen, ið spælir á Summar Festivalinum í ár**

SUMMAR FESTIVALUR
*Solby A. Eliasen*

Ein av bestu føroysku sangskrivarunum í nýggjari tíð fer at framføra allar sínar kendu sangir á Summar Festivalinum. Vestmenningurin Martin Joensen hevur skrivað eina øgrynnu av góðum sangum, sum føroyingar kenna og hava tikið til sín.Tann gamli Svarti Ravnur er bara tann fyrsti í eini langari røð av hittum, sum Martin Joensen hevur gjørt, sungið og spælt.

Útgávurnar hjá Vestmonnum í 80'unum vóru tiltiknar, og har hevði Martin ein týðandi fingur við í spælinum. Seinni hevur hann givið tónleik út á solofløgum, og har hevur eyðkendi stílurin hjá Martini livað víðari.

**Samband við áhoyrarar**

Sangir sum Morgun, Ró, Pengar, 60'ini, Eg havi tað gott og nógvir, nógvir aðrir eru komnir burtur úr sangskrivingini hjá Martini, og tað er ein perlurøð av fólksligum poppsangum, sum Martin trívur í, tá ið hann fer á pallin saman við sínum bólki.

Og sambært Martini Joensen sleppa sangirnir veruliga at standa sína roynd, tá ið hann hevur framførslur.

- Tá eg standi á pallinum og spæli og syngi, merki eg, um tað tilfarið, ið eg havi gjørt, veruliga heldur ella ei, sigur Martin Joensen og leggur afturat, at tær ferðirnar, hann merkir, at bólkur og áhoyrarar eru eitt undir framførsluni, er uppgávan røkt til fulnar.

- Og tað skal ikki bara vera, meðan vit spæla hittini, men helst undir allari framførsluni, sigur hann.

Martin Joensen fer at spæla leygarkvøldið á Summar Festivalinum.

# Maggie Reilly hevur heimspremieru í Føroyum

**Skotska songkvinnan Maggie Reilly ætlar at syngja síni stóru hitt á Summar Festivalinum, men við sær hevur hon eisini spildurnýggja fløgu, sum føroyingar sleppa at hoyra, áðrenn hon verður givin út aðrastaðni í Europa**



SUMMAR FESTIVALUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Moonlight Shadow er størsta hittið, sum Maggie Reilly nakrantíð hevur sungið. Sangurin, sum Mike Oldfield skrivaði til hennara rødd, var eitt megahitt fyrst í 80'unum, og her í Føroyum var sangurin eisini tráðspældur.

Hendan sangin ætlar Maggie Reilly sjálvsagt at spæla fyri føroyingum, tá hon fer á pallin á Summar Festivalinum. Og hon ætlar sær eisini at tríva í aðrar kendar sangir hjá sær sum To France og Everytime We Touch.

Men við sær hevur Maggie Reilly eisini eina spildurnýggja fløgu, sum hon júst hevur spælt inn.

- Almenni útgávudagurin fyri fløguna er 15. september, men vit ætla okkum at taka nakrar fløgur við til Føroya, so at føroyingar kunnu verða teir fyrstu at hoyra sangirnar á útgávuni, sigur hon.

**Sonurin fylgir væl við**

Maggie Reilly skal í heyst ferðast við hesum tónleiki í Onglandi og aðrastaðni í Europa, men eisini her standa føroyingar fremst í køini, tí konsertferðin byrjar á Summar Festivalinum í Klaksvík.

- Eg gleði meg sera nógv at koma til Føroya at spæla. Sonur mín er sera áhugaður í norðurlondum og norðurlendskum rocktónleiki, og hann sigur, at nógvur góður rocktónleikur er í Føroyum, sigur Maggie Reilly, sum er fødd í skotska býnum Glasgow, har hon eisini er búsitandi.

*- Eg gleði meg sera nógv at koma til Føroya at spæla. Sonur mín er sera áhugaður í norðurlondum og norðurlendskum rocktónleiki, og hann sigur, at nógvur góður rocktónleikur er í Føroyum, sigur Maggie Reilly, sum gevur nýggja fløgu út í september*